## 1957

Victor Danielsen letur úr hondum bókina »Tríggjar smásøgur«, sum hann týddi úr íslendskum eftir Guðrun Lárusdóttur

## 1961

Victor Danielsen letur úr hondum bókina »Hygg á Jesus«, sum hann týddi úr donskum

## 1961

Victor Danielsen andast 2. februar í Fuglafirði

# Eitt sendiboð til smáplássini

- Endamálið við ferðunum var stutt og greitt at boða evangeliið, allar staðir har vit komu við Sendiboðinum, sigur Jógvan Gerðalíð úr Klaksvík

*Sendiboðið*

92 ára gamli klaksvíkingurin var ikki so nógv við á hesum ferðunum, tí hann var bóndi og hevði neyt sum skuldu ansast hvønn einasta dag. Tað var sum oftast um kvøldið ella sunnudagar at Jógvan Gerðalíð var við Sendiboðinum.

Fyri gamla, men kortini virkna andaliga stríðsmannin vóru hetta minniligar ferðir og sera ríkar løtur, ikki minst tí at Victor Danielsen hevði so góð evni at koma í samband við fólkið á staðnum.

- Hann var sera effektivur, og brúkti hvørja løtu til eitthvørt andaligt arbeiði, greiðir Jógvan Gerðalíð frá.

Seinast í 40'unum, sum var um tað mundið at teksturin til Bíbliuna varð settur, hevði Victor Danielsen royndarprent av henni við sær umborð á Sendiboðið bæði til rættlestur og til upplestur.

Á eini av hesum ferðum stendur skrivað í dagbókini hjá bátinum fyri 8. juli 1947: »Lisið verður av og á í einum royndarprenti av teirri føroysku Bíbliuni. Flest allir halda málið vera toluliga gott, kanska í fornara lagi«.

- Jú, Victor Danielsen var ein ótrúligur prædikumaður, staðfestir Jógvan Gerðalíð.

## Spiltur møguleiki

Jógvan Gerðalíð var sjálvur ikki við í hesum serstaka háttinum at boða evangeliið at byrja við.

Tað vóru aðrir menn úr samkomuni, sum fingu hjarta fyri at røkka fólkinum á smáplássunum við boðskapinum. Við einum góðum maskinbáti var einfalt og lætt at sigla og koma fram bæði í Norðoyggjum, Nólsoy, kring Eysturoynna og Sundalagið og allan vegin til Suðuroyar.

Victor Danielsen var ein av ídnu monnunum á hesum ferðunum kring oyggjarnar, og vildi alla tíðina, at ein røkk so víða sum tilbar. Her taldi hvør einasti tími og hvør einasta løta.

Hetta gav at bíta einaferð, tá teir høvdu sett kós ímóti Tjørnuvík. Her møttu teir einum manni, sum í góðveðrinum henda dagin var á veg undir Stakkin. »Um teir høvdu hug at koma við ein túr?«

Jú, hesum forvitnisliga tilboðnum tóku teir fegnir við. Teir vildu so ikki vera óblíðir við henda mannin.

- Tá minnist eg, at Victor Danielsen helt fyri: »Hmm, nú spældu vit okkum av við eitt møti!«.

- Jú, hansara hægsta ynski var at menniskju skuldu hoyra boðskapin, sigur Jógvan Gerðalíð.

## Eyðkendur bátur

Skipanin við ferðunum var hon, at teir í flestu førum kannaðu veðurlíkindi og streym, og settu síðani kósina ímóti tí ávísa staðnum ella støðunum.

- Nei, vit plagdu ikki at boða frá hesum frammanundan. Heldur ikki, tá vit



***»Teir sigla so væl sín fríða knørr«. Her eru fleiri teirra umborð á Sendiboðinum – vinstrumegin Jógvan hjá Jens Chr. í Toft, Dánjal, Victor og Theodor við Keldu***